Eik



# Billán

Billán er til tín, sum er yvir 18 ár, og sum skal hava lán til keyp av nýggjum ella brúktum bili. Eini góð ráð eru, at tú gert upp við teg sjálva/n, hvussu nógv tú vilt gjalda mánaðarliga. Eru nøkur ár, til bilurin skal skiftast, so átti tú møguliga at umhugsað at spart upp nú.

Eitt er fíggingin til keypið. Neyðugt er eisini at hugsa um raksturin, ið t.d. krevur útreiðslur til trygging, brennievni, vektgjald, umvælingar og viðlíkahald.

**Treytir og kostnaðir**
Er talan um ein nýggjan bil, er neyðugt við einari eginfígging á 20%. Jú størri tín eginfígging er, jú bíligari er lánið. Harafturat má bilurin vera fult tryggjaður, um hann er veittur sum trygd fyri láninum.

Fyri at Eik kann viðgera umsókn til billán, skulu hesar upplýsingar fyriliggja: keypsprísur, merki, slag, árgangur, stell nr., skrásetingarnr.

Rentan á billáninum er broytilig og verður m.a. sett eftir, hvussu stórt útgjaldið er.

**Afturgjaldstíð**
Afturgjaldstíðin fyri ein nýggjan bil er í mesta lagi sjey ár. Er talan t.d. um ein 2 ára gamlan bil, er afturgjaldstíðin í mesta lagi fimm ár.

**Rokna billán**
Skanna kotuna við telefonini og kom beinleiðis inn á rokniamboðið

www.eik.fo

20.06.2012